FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 27. januar 2020
J. nr.: 20/00036-2

Svar upp á fyrispurning nr.45/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Jóhan Dahl, løgtingsmanni, um útisiglarar og eftirlønargjald, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum Jørgen Niclasen

Spurningar:

1. Hvussu langt áleiðis er arbeiðið komið at broyta føroysku eftirlønarlógina, kunngerð til eftirlønarlógina ella dagføra norðurlendska sáttmálan, soleiðis at føroyskir útisiglarar sleppa undan at gjalda eftirløn til tvær eftirlønarskipanir?

2. Nær kann væntast ein loysn, so at greiða fæst á hesum málinum?

Svar:
Lógarbroyting er sent til hoyringar, har mælt verður til, at inntøka forvunnin uttanlands fyri útlendskan arbeiðsgevara verður frítikin frá at rinda eftirlønargjald.

Um uppskotið verður samtykt í vár, fær broytingin virknað longu frá inntøkuárinum 2019, soleiðis at tey við slíkari inntøku sleppa undan kravinum um eftirlønargjald í heyst.

Tinganes, 27. januar 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum